*– Tað ringasta er, at vit ikki kunnu flúgva heim til Australia og feira hetta.*

*Guus Hiddink, venjari hjá Australia, eftir at landið kom víðari í HM*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801



# Eysturoyingur kappast ímóti sær sjálvum



**Nú er tað moralski sigurin og eftirmælið, sum vónbrotnu rógvararnir siga seg hugsa meiri um enn um FM heitið, ið teir ikki duga at ímynda sær, at tað skal bera til at vinna**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Hóskvøldið gjørdi manningin á Eysturoyingi upp við seg sjálva, at teir fara til Vágs at rógva í morgin. Eftir klokkan níggju í góðveðrinum hóskvøldið var báturin aftur at síggja á fjørðinum, og teir ætla sær lítlan túr í kvøld. Hvussu tað fer at hilnast hjá teimum í morgin ímóti væl trimmaða Klaksvíkingi er spurningurin, sum skuggar yvir allar aðrar undan jóansøku róðrinum, sum verður á Vágsfirði í morgin.

– Teir hava verið í góðari venjing. Hesa síðstu vikuna hevur talan tó verið um ikki ætlaða niðurtrapping. Teir vandu lítið undan Eystanstevnuni, leygardagin kappaðust teir ikki, og í hesi vikuni hevur venjingin verið lítil, staðfestir formaðurin í Kappróðrarfelagnum NSÍ, Sámal Hansen.

Manningin fundaðist fleiri ferðir fyrrapartin av vikuni. Tað var serliga ákæran um, at tað var lítið sømiligt av teimum ikki at flota bátin aftur eftir keðiligu hendingina síðsta leygardag, sum var orsøk til, at Eysturoyingur fer at kappast í morgin. Hetta eftirmælið vilja teir ikki hava á sær.

– Vit kenna okkum burturdømdar, so tað stendur eftir í. Vit halda, at RSF við avgerðini týskvøldið um broyting í ásetingum fyri møguleikan at skjóta róðrar av, týðuliga hevur givið til kennar, at teir eisini halda hetta, sjálvt um teir einki vilja gera við kiksaran síðsta leygardag, sum vit halda var teirra og ikki okkara. Nýggju ásetingina eru vit fegnir um, tí vit løgdu upp til hetta á økisfundinum, sum vit høvdu saman við umboðum fyri RSF. Tá vóru teir ikki sinnaðir í at umrøða hetta, men tað eru teir nú.

Hvat sipar tú til?

– Í fjør hekk Sølmundur eftir í startinum, og tað kostaði teimum róðrarárið. Tað var spell, tí teir vóru væl trimmaðir og vandir. Vit skutu upp, at bátur, sum tjóvstartar, skal kolldømast beinanvegin, og at róðurin skal skjótast av, um bátur hongur eftir. Tað er hetta síðsta, sum nú er komið í ásetingarnar, vísir formaðurin í Kappróðrarfelagnum NSÍ á.

Tá ið tosið kemur inn á útlitini fyri kappingini millum 10-mannafórini, er spádómurin hjá bátasmiðinum, roynda rógvaranum, stýrimanninum og formanninum í Kappróðrarfelagnum NSÍ hesin:

– Klaksvíkingur rør væl, og hann er stórfavorittur. Vit vóna sjálvandi, at tað fer at eydnast Eysturoyingi at vinna. Manningin rør fyrst og fremst ímóti sær sjálvari. Eftir at teir síðani leygardagin hava verið heilt á botni, skulu teir nú royna at prógva fyri sær sjálvum, at teir sinniliga kunnu lyfta seg uppaftur. FM heitið hugsa teir ikki um. Heldur snýr tað seg um at vinna moralska FM heitið. Vánirnar fyri tí eru nógv treytaðar av, hvussu tað fer at hilnast í Vági.

Allar kappingarnar í Vági vera á túsund metrum. Tað plagar at verða sagt, at tað hevur týdning, um bátarnir liggja undir grótkastinum, ella um teir liggja í siglingarrennuni. Bestu bátarnir liggja borð um borð. Hesa ferð verða Klaksvíkingur og Eysturoyingur ikki undir liðini á hvørjum øðrum. Eysturoyingur verður nærri siglingarrennuni, meðan Klaksvíkingur verður undir grótkastinum.

At allir sjey róðrarnir vera á 1000 metrum ber við sær, at RSF hevur broytt røðina, sum tað verður róð í, eitt sindur. Hesa ferð kappast 6-mannafórini við monnum frammanundan 5-mannafórunum við dreingjum. Røðin verður altso henda: 5-mannafør gentur, 6-mannafør kvinnur, 5-mannafør kvinnur, 6-mannafør menn, 5-mannafør dreingir, 8-mannafør og 10-mannafør.

## NSÍ kann ota seg heilt fram

**NSÍ kann fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum veruliga blanda seg upp í oddastríðið, um liðið vinnur sunnudagin. Uppgávan er tó trupul, tí NSÍ spælir á útivølli ímóti toppliðnum GÍ**

GÍ-NSÍ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað verður eitt veruligt brak á skránni í Gøtu sunnudagin. GÍ, sum hevur tikið øll á bóli í ár, skal spæla ímóti NSÍ, sum er við at koma fyri seg eftir ivasama byrjan.

GÍ hevur verið áhaldandi í toppinum í Formuladeildini í ár, og eftir sigurin á HB í Havn fyri góðari viku síðani tykist liðið veruliga hava staðfesta sína styrki og ætlan í hesum kappingarárinum.

NSÍ hevur havt misjøvn úrslitið, men teir hava nú togað seg fram ímóti toppinum, og um liðið vinnur í Gøtu verða teir við vissu nummar tvey á stigatalvuni.

NSÍ hevur so at siga allar spælarar tøkar til dystin sunnudagin. Danial Hansen hevur verið sjúkur í vikuni, og hann er ivasamur. Helgi L. Petersen er staddur uttanlands, men kemur heim áðrenn dystin og verður møguliga við.

GÍ hevur alt fólkið tøkt til dystin. Eingi leikbann eru, og eingir nýggir skaðar eru heldur. Pól Ennigarð, sum hevur verið skaddur í eina tíð, er farin at venja við bólti aftur, men hann spælir ikki sunnudagin.

## Tølini tala

| | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-HB | 2-2 | 2-3 | 4-3 | 1-1 | 1-2 | 3-2 | 0-2 | 1-2 | 0-0 | 2-2 | 0-2 | 0-1 | 2-4-6 | 16-22 |
| VB/S-B68 | 3-2 | - | - | 2-3 | 1-0 | 1-2 | 1-1 | 4-1 | 0-2 | 3-1 | 3-0 | 2-0 | 6-1-3 | 20-12 |
| Skála-EB/S | - | 1-1 | - | 2-3 | 3-2 | 3-1 | - | - | - | - | - | - | 2-1-1 | 9-7 |
| GÍ-NSÍ | 1-1 | 1-5 | 0-0 | 1-1 | 1-1 | 0-2 | 0-1 | 1-0 | 1-3 | 5-1 | 2-0 | - | 3-4-4 | 13-15 |
| B36-ÍF | - | 1-1 | - | 4-1 | - | - | - | - | 4-2 | 7-2 | 8-3 | 4-0 | 5-1-0 | 28-9 |